## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Læknastjóraskifti á Landsjúkrahúsinum

**Fríggjadagin 25. februar var móttøka í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum í sambandi við at Tummas í Garði tók við sum nýggjur læknastjóri eftir Petur Ellefsen**

MÓTTØKA

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Tummas í Garði (v.m.) tók við sum læknastjóri eftir Petur Ellefsen*

Umframt starvsfólkini á Landssjúkrahúsinum komu familja vinir og kenningar til móttøkuna. Tey sum hildu røðu vóru: Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, Poul Gert Hansen, sjúkrahússtjóri, Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri, og Petur Ellefsen, fráfarndi læknastjóri, og nýggi læknastjórin, Tummas í Garði.

Poul Gert Hansen segði m.a. í røðu síni "Endiliga eru vit samlaði her til læknastjóraskifti - nakað, ið Petur helst hevur sæð fram ímóti í longri tíð. Tað vóru serligar umstøður, sum gjørdu, at tú komst í starvið sum læknastjóri. Tað var ikki tí tú brennandi ynskti tað.

Læknastjórin var júst farin frá og tað var tørvur á at fáa stabiliserað álitið aftur millum læknar og leiðslu. Har vart tú tann rætti persónurin - vóru vit nógv, sum hildu. Tú játtaði at vera við, og tú hevur eisini klárað tað fyrimyndarliga væl.

Títt gemytliga sinni og strategiska umhugsunarsemi hevur verið gott fyri leiðsluna. Tú hevur haft gott skil á øllum málunum og er arbeiðssamur sum fáur.

Tú ert oyrnalækni, og eg veit ikki, um tað er tí, at tú hevur serliga góðar eginleikar at lurta. Hetta er í hvørt fall ein týdningarmikil leiðslueginleiki í eini stórari og kompleksari organisatión, sum eitt sjúkrahús er".

Og so til Tummas, "Tú hevur eitt avbera gott útgangsstøði at fara inn í hetta arbeiðið við. Síðani tað bleiv alment kent, at tú vart settur í starvið sum læknastjóri, havi eg bara fingið positivar afturmeldingar frá fólki. Bæði innan fyri og uttanfyri sjúkrahúsið.

Túsund takk fyri eitt gott samstarv Petur og vælkomin í leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, Tummas".

Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri, segði m.a. í røðu síni, at tað var eftir eina nokkso turbulenta tíð, at Petur Ellefsen tók yvir sum læknastjóri.

"Landssjúkrahúsið hevði brúk fyri arbeiðsfriði, og tað fingu vit, fyrst og fremst í sjúkrahúsleiðsluni, men í veruleikanum eisini í restini av húsinum.

Tú ert góður við Landssjúkrahúsið og Landssjúkrahúsið, hevur gleði av at hava ein sum teg.

Takk fyri tað góða samstarvið og vil eg ynskja tær alt gott framyvir".

Síðan ynskti hon Tummasi í Garði vælkomnan sum læknastjóra á Landssjúkrahúsinum. "Eg síggi fram til eitt spennandi og avbjóðandi samstarv í sjúkrahúsleiðsluni. Sum tú longu ert vitandi um, so liggja stórar, týdningarmiklar og eisini truplar uppgávur sum skulu loysast fyri framman".



*Petur Ellefsen, fráfarandi læknastjóri, Poul Gert Hansen, sjúkrahússtjóri, Marin Vang, sjúkrøktarstjóri, og Tummas í Garði, nýggjur læknastjóri*



*Yvirlæknarnir Odmar Færø og Anders Harboe Ree*



*Nógv fólk vóru til móttøkuna, og góður matur var at fáa*



*Familjan var eisini við til móttøkuna: Tummas og Elsa í Garði og børnini Jógvan og Kirstin*